## Klitschko framvegis heimsmeistari

Ukrainski Vitali Klitschko vann í gjárkvøldið upp á tekniskt konockout í 10. umfarinum, tá hann varði HM-heiti hjá WBC í dysti móti mexicanska Cristobal Arreola. 38 ára gamli Klitschko var betri boksarin frá fyrsta umfari, og eftir dystin segði hann, at hann hevði væntað sær meira mótstøðu frá 28 ára gamla avbjóðaranum. Arreola hevði ongan tíð tapt nakran dyst í tungvekt, áðrenn hann í gjár møtti sínum yvirmanni í Klitschko, sum annars gavst við nevaleikinum í 2005, men sum í fjør gjørdi av at royna seg aftur.



## Toni forvinnur mest

Hóast hann vanliga byrjar á beinkinum, so er italski Luca Toni best lønti spælarin í týsku bundesliguni. Toni fær 70 mió krónur um árið frá Bayern München, og tað er meira, enn nakar annar spælari forvinnur í Týsklandi. Næstir á listanum, sum Bild hevur almannakunngjørt sær soleiðis út við øllum tølum í milliónum krónum um árið. Alexander Hleb (45), Grafite (35) og Sebastian Kehl (25).

### B68-07 Vestur 3-0 (1-0):

# B68 tók seg saman



Leingi sá púra steindeytt út á Svangaskarði, men eftir at Óli Olsen undan steðginum skoraði upp á brotsspark, var eingin ivi um, hvønn veg dysturin skuldi fara

Mynd: Álvur

B68

07 Vestur

**Eftir linligt fyrra umfar var eftir steðgin eingin ivi um, at toftamenn vóru omaná og niðurflytararnir úr Vágum undir**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í gjár var síðsti dysturin í hesum umfarinum í Vodafonedeildini á Svangaskarði. Toftamenn hava verið knáir á heimavølli í ár, um enn teir ikki hava fingið so nógv burturúr, sum tað kanska ofta hevur ljóðað frá.

07 Vestur dysturin var tann trettandi á heimavølli í ár. B68 vann 3-0, og hetta var áttanda ferðin, at toftamenn vunnu fulla úrtøku á heimavølli. Nú valdast tað um, hvussu tað fer at hilnast leygardagin, tá ið B68 fer at vitja B36. Í løtuni eru toftamenn á fjórða plássi, og tað kann gott vera, at teir fara at halda tørn um ta plaseringina.

Møguleiki er framvegis fyri, at toftamenn seinnapartin leygardagin fara at vinna bronsukrónurnar, og tað er eisini møguleiki fyri, at teir kunnu detta niður á fimta plássið. Tað valdast, hvussu tað fer at hilnast, tá ið B68 fer at vitja B36, sum í gjár fekk endurnýggjað atgongumerkið til bestu deildina, og hvussu tað fer at hilnast hjá Víkingi og NSÍ, sum fara at spæla ávikavíst á Argjum og í Fuglafirði.

Tað er stórur munur á, hvat hesar endastøðurnar bera við sær. Fimta plássið gevur ongan rætt til altjóða fótbólt, men tað ber við sær rætt til ein eyka heimadyst, sum tey frá 6. plássi og niðureftir ikki fáa. Undir øllum umstøðum fer endastøðan í ár at bera við sær, at B68 næsta ár fer at spæla eina ferð meiri á heimavølli, enn talan hevur verið um í ár.

Fjórða plássið ber rættin at spæla Intertoto Cup fótbólt næsta summar við sær. Tað er altíð hugaligt at fáa høvið at royna seg uttanfyri landoddarnar, men hvat inntøkum viðvíkur verður ikki talan um serliga stóra upphædd. Steypavinnararnir í Víkingi og silvurvinnararnir í EB/Streymi hava tryggjað sær luttøku í innleiðandi umfarinum í europeisku liguni og harvið 800 túsund í inntøku ella umleið tíggju falt tað, sum fæst fyri at taka lut í Intertoto.

Sjálvt um tað hevur hilnast væl hjá B68 á heimavølli, so er tað á heimavølli, at toftamenn hava mist tey fimm ella seks stigini, sum nú høvdu verið hent fyri at røkka silvurkrónunum ella uppaftur fínari krónum. B68 hevur tapt eina ferð á heimavølli, og fýra ferðir hevur úrtøkan verið eitt stig.

### Sum eftir ánni

Longu niðurflutta 07 Vestur vitjaði á Svangaskarði, og leingi var munurin lítil og eingin. 07 Vestur hevði fleiri ungar menn á liðnum. Tað ber boð um, at teir har vesturi eru farnir at hugsa um at seta fólk við, sum teir ætla skulu vera stuðlar á liðnum, tá ið teir næsta ár ætla at spæla seg upp aftur í bestu deildina.

Talan var um 16 ára gamli Rógva Egilstoft Nielsen, sum alla tíðina var vinstri vongverji, Eli Falkvard Nielsen, sum í síðstu viku fylti 17, var alla tíðina á miðvøllinum, og 17 ára gamli Henning S. Joensen og 16 ára gamli Holgar Djurhuus vórðu skiftir inn. Hesin seinni fyri Tór-Ingar Akselsen, sum orsaka av skaða ikki kom á vøllin aftur eftir hvíldina.

Óli Olsen legði stutt undan steðginum heimaliðið framum við brotssparki. Tað varð dømt, tá ið Remi Langgaard fór um koll í brotsteiginum. Hetta var fyrsta ferðin, at 17 ára gamli og evnaríki Remi var millum teir fyrstu ellivu, og so gekk tað sum eftir ánni hjá heimaliðnum.

Í 2. hálvleiki var eingin ivi. B68 var leikliga omaná, og tá ið tað restaðu ein tjúgu minuttir høvdu toftamenn tryggjað sær 3-0 sigurin. 2-0 málið skoraði Nenad Stankovic eftir uppspæl í høgru, har Jóan Símun Edmundsson og Keita vóru við, og innskifti Jóhan Petur Poulsen skoraði síðsta málið á Svangaskarði í ár, tá ið hann av brotsteigarmarkinum sendi bóltin í málið.

## Eru farnir at seta við

Eingin ivi man vera um, at Tór-Ingar Akselsen hevur verið mest eyðsýndi 07 Vestur spælarin í ár. Tór-Ingar kom ikki á vøllin eftir steðgin. Hann var darvaður av skaða frá uppgerðini í Klaksvík næstsíðsta sunnudag.

Tór-Ingar helt ikki, at munurin hevði verið so stórur í 1. hálvleiki, men í 2. hálvleiki var eingin ivi um, at heimaliðið var omaná.

Tór-Ingar hevur áður verið meistari við HB:

- Vit gleða okkum leygardagin at fáa vitjan av meistarunum. Tað er tungt at flyta niður. Í dag vóru fleiri ungir spælarar á liðnum. Næsta ár fara teir at fáa størri leiklut, tá ið tað aftur skal arbeiðast við at vinna pláss í bestu deildini, har vit kenna okkum at hoyra heima, segði veteranurin, sum ein av næstu døgunum roknar við at fara at tosa við leiðsluna í felagnum um, hvussu tað verður næsta ár.

-jh

## Bill hugsar ikki um bronsuna

B68 venjarin, Bill Jacobsen, var sjálvandi væl nøgdur við, at tað hevði eydnast hansara monnum at vinna trivaligan 3-0 sigur.

- Eg haldi ikki, at talan var um serligan mun á liðunum í 1. hálvleiki. Eftir steðgin var leikferðin hjá okkum hægri, og tá skoraðu vit tvey góð mál.

Tað er framvegis møguleiki fyri, at tit skulu enda ovast av liðunum í Eysturoy?

- Nú fáa vit at síggja. Vit hugsa um okkara uppgávu, sum verður ivaleysa stór ímóti B36 í Gundadali. Víkingur og NSÍ skulu eisini spæla á útivølli. Teir fokusera sjálvandi upp á avbjóðingarnar á Argjum og í Fuglafirði. Seint seinnapartin leygardagin fara vit at gera upp.

-jh